Hanus og Helena Samuelsen hittust á Lææraraskúlanum og giftust eftir loki› prógv. Tey búsettust í Hoyvík. Á vegginum vinstrumegin sæst myndin, Hanus fekk, tá hann hev›i 40 ára starvsdag á Studentaskúlanum

Mynd: Edvard Joensen

Í or›atøk vóru telgd

Føroyska máli› gerst ov fátækt, tá gamla máli› dettur burtur. Máliskur og or›atøk, sum tey gomlu n‡ttu, hvørva, tí eingin kennir ta›, tey gomlu tóku til, heldur Hanus A. Samuelsen, sum hevur veri › lærari í føroyskum í ein mansaldur

VI‹TAL
Seinni partur
Edvard Joensen

Føroyska máli› er vor›i› fátækari í or›avali og vendingum, heldur Hanus A. Samuelsen, lærari í føroyskum á Føroya Studentaskúla.

Hann heldur, at gamli føroyingurin, sum hann kendi í sínum ungdómi í Húsavík, tosa›i eitt rættiliga gott mál, hóast ta› var ógvuliga ávirka› av donskum. Men máli›, tey brúktu, var ramligt og fjølbroytt. Fult av gó›um tiltøkum, sum Hanus saknar í dag. Í dag er máli› hjá nógvum rættiliga stirvi› og einstátta›.

Ein grund til, at gamlar máliskur hvørva úr málinum kann vera, at arbei›i›, tey høvdu fyrr, dettur burtur. Fólk kenna ikki ta›, tiki› var› til, og hava tí einki at brúka tey or›afellini til.

Í hesum sambandi nevnir hann ta› at fáast vi› sey › ella landbúna› sum heild. Fólk kunnu finna upp á at brúka ymsar málsligar vendingar ha›ani, uttan at hava hóming av, hvat tær í grundini merkja. Úrsliti› ver›ur mangan okkurt heilt undarligt, sum einki skil er í.

Hanus fegnast tó um ta›, sum vunni› er í n‡ggjari or›ager›. Vit hava fingi› rættiliga nógv gó›, n‡ggj or› fyri n‡ggj ting, sum komin eru. Men Hanus Samuelsen metir tó, at ta› gongur so skjótt í heimssamfelagnum, at vit hava helst ikki møguleika fyri at finna n‡ggj or›, so hvørt okkurt n‡tt kemur inn á okkum. Tó eiga vit ongantí› at gevast, men alla tí› manniliga at verja gar›.

Um máli›, næmingarnir hava vi› sær í studentaskúlan í dag, sigur Hanus, at ta› er rættiliga ójavnt, uttan tó at hava hug at greina ta› nærri. Tó sigur hann, at ta› eru rættiliga nógv, sum hava ilt vi› at stava rætt. Og tá fólk so fara út í gerandislívi›, eitt nú á almennar stovnar og tilíkt, eigur at kunna krevjast av teimum, at tey duga at stava føroyskt mál rætt, sigur Hanus A. Samuelsen.

Og blø›ini eru ikki petti mætari, heldur hann. Har fer nógv út, sum átti at veri› ørvísi. Ta› má kunna krevjast av blø›unum, at ta›, tey bera fólki, er málsliga rætt.

Men sjálvandi broytist máli› vi› tí›ini, tí máli› er jú livandi og undir stórari ávirkan uttaneftir.

Tey ungu í dag fylgja væl vi› tí, sum hendir rundan um okkum, og eru kring í serliga enskum máli, sigur Hanus. Og hava vit ikki tann hugbur›, at vit alla tí›ina eiga at vanda okkum um og verja máli›, b‡›ur tí ikki bøtur, er metingin hjá húsvíkinginum, i› sum ungur kom til Havnar, har hansara lívsstarv var› at undirvísa ungfólki úr øllum landinum í føroyskum máli.

Heimbygdin dregur

Ta› er greitt, at ta› var eitt rættiliga stórt umskifti hjá einum unglingi at koma úr Húsavík til Havnar í 1953.

Serliga dámdi Hanusi væl at ganga á bókasavni›. Bókasavni› var Landsbókasavni›, sum var á Debesartrø›. Lesihugurin var sjáldsama gó›ur, so ta› var sum ein n‡ggjur heimur, i› har var› latin upp.

Hanus grei›ir frá, at ofta var› fari› á bókasavni› at leita eftir stílaevnum. Men ta› var vanligt, at so nógv anna› áhugavert og spennandi var at finna, sum eisini var› tiki› vi› á somu fer›ini.

Ikki var› fer›ast í millum tá sum nú. Og frítí›in var lítil. Umframt summarfrí›ina var jólafrítí›in tann stóra, og tá skuldi farast heim til Húsavíkar.

Ritan sigldi til Skopunar, og á Sandoynni var vegur millum bygdirnar, so har var ikki so ringt at fer›ast tá, grei›ir Hanus frá.

Í 1956 var› Hanus li›ugur á Studentaskúlanum, og so var at finna út av, hvat gerast skuldi ví›ari. Prógvi› var gott, so ta› var sum so einki, sum for›a›i fyri nakrari ávísari ví›ari útbúgving.

Men drátturin at Húsavík var stórur, og Hanus gjørdi av ikki at fara av landinum, sum tá mestsum bara var til Danmarkar, at lesa beinanveg.

Hanus flutti aftur til Húsavíkar og var› vikarur í barnaskúlanum har su›uri vi› studentsprógvi, sum tá var rættiliga vanligt.

Hendan tí›in gjørdi, at hann gjørdi av at fara á Føroya Læraraskúla. Ta›, at hann var studentur, gjørdi eisini, at tí›in á Læraraskúlanum var› stytt eitt sindur.

Enn einafer› kom Hanus »ov seint« í skúla. Av tí at hann fekk ni›ursetta tí›, kom hann á vári í 1958 inn í árgang ‘56 flokkin á Føroya Læraraskúla. Og heldur ikki her stó› á at fullføra.

Á Læraraskúlanum hitti Hanus Helenu, sum seinni bleiv kona hansara. Tey vór›u li›ug samstundis í 1960 og giftust í 1961.

Lívsstarvi› byrjar

Hanus A. Samuelsen søkti og fekk starv á Føroya Studentaskúla, tá hann var li›ugt útbúgvin lærari í 1960. Og í hesum starvi er hann framvegis.

Hanus grei›ir frá, at fyrstu f‡ra árini gekk ta› stillisliga fyri seg. Hann undirvísti í fleiri lærugreinum, sum ikki var óvanligt. Alt gekk sum vanligt fram til 1964. Tá fór skúlin av álvara at vaksa. Tá komu nógvir næmingar, bæ›i til real- og studentaskúlan.

Flokkarnir gjørdust fleiri og sostatt eisini tímarnir til hvørja lærugrein. Hanus var› tí bi›in um at undirvísa studentaskúlanæmingum í føroyskum. Og í 1967 førdi hann teir fyrstu av hesum studentunum upp til próvtøku.

Hann hugsar seg um eina løtu. Leitar eftir nøvnum og sigur so, at tá hann í dag hyggur seg um í samfelagnum, eru mangir av teimum persónunum, sum í dag líkasum mynda samfelagi›, fólk, sum hann hevur havt sum næmingar í síni tí›. Prestar, og læknar. Politikkarar og studentaskúlalærarar, og hvat nú øll eru vor›in.

Hanus roknar eitt sindur eftir fyri at finna fram til, hvussu nógvar næmingar hann man hava havt hesi árini. Ilt er at siga nágreiniliga solei›is í eini knappari vend. Naka› væl oman fyri túsund munnu teir vera, heldur hann. Kanska út mót tveytúsund.

Og at minnast allar ber ikki til, sigur hann. Men teir fyrstu, hann hev›i, heldur hann seg kenna allar kortini.

Hinvegin eru ta› eisini persónar, sum eri komnir rættiliga væl fyri í samfelagnum, sum hann hevur havt sum næmingar, uttan tó at minnast teir aftur.

Hanus A. Samuelsen hevur altí› havt gó›an hug til bókina. Hann hevur lisi› nógvar, og sjálvur eisini veri › vi› til at skriva onkra. Heima hevur hann nógvar bøkur, sum hann kagar í

Mynd: Edvard Joensen

Hevur trivist væl

Hanus sigur, at hóast ta› kann tykjast at vera sama mylnan at fara í gjøgnum ár um ár, er ta› kortini ikki so. N‡ggj fólk koma, me›an onnur fara, og øll eru ymisk. So alt í alt er rættiliga stór umskifting alla tí›ina.

Men ta›, sum hevur talt eina mest er, at hann hevur trivist væl í starvinum, sigur hann.

Broytingar eru hendar hesi árini, Hanus A. Samuelsen hevur undirvíst. Realskúlin fall burtur, og HF skei›ini komu aftrat. Hanus fór at undirvísa í føroyskum burturav, og ta› dámar honum væl.

Hann grei›ir frá, at hann gekk á árskei›i í føroyskum hjá Christiani Matras á Fró›skaparsetrinum, fyrsta ári› Christian Matras var komin aftur til Føroya. Hetta skei›i› var í 1964-1965. Sí›an hevur hann luttiki› í ymsum skei›um, sum veri› hava.

Føroyskt mál hevur altí› havt hansara áhuga, grei›ir Hanus frá. Ta› kemst ikki minst av tí tjó›skaparliga medvitinum, hann hevur vi› sær úr Húsavík. Har í bygdini var nógv sjálvst‡risfólk.

Hanusi dámdi væl norrønt mál, sum hann las rættiliga nóg og harvi› fekk stóran kunnleika til. Ta › hevur hann kunna› brúkt í undirvísingini seinni.

Lívi› hevur givi › avbjó›ingar

Hanus og Helena Samuelsen bygdu uppi í Hoyvík. Hetta var nær vi› arbei›splássi› hjá Hanusi á Studentaskúlanum í Hoydølum. Tey eiga tvey børn. Óla og Janu.

Vi› Janu broytist lívi› munandi, sigur Hanus. Jana er breka› og treingir til røkt og umsorgan alla tí›ina. Og ta› er greitt, at tá solei›is er, ver›ur anna› valt frá.

Tá Jana var› fødd í 1966 vóru ikki teir stóru møguleikarnir at velja ímillum. Tá læknarnir søgdu, hvat henni bagdi, var at hava hana heima,ella at senda hana á Rødbygård. Helena og Hanus valdu at hava Janu heima.

Ta› var stríggi›, grei›ir Hanus frá. Nógv fer›ing aftur og fram til sjúkrahús í Danmark.

Ta› var sera trupult at hava eitt breka› barn i Føroyum tá. So nógvar hugsanir vór›u gjørdar um, hvørt tey skuldu flyta til Danmarkar ella ikki. Men tey valdu at ver›a ver›andi og heldur royna at arbei›a fyri at fáa betri umstø›ur í Føroyum.

Ta› arbei›i›, tey gjørdu tá, sigur Hanus, var› ein av grundunum undir felagnum Javna, sum seinni var› stovna›. Helena Samuelsen gjørdist fyrsti forma›ur í Javna og var forma›ur felagsins í nógv ár.

Hesi árini vór›u sera virkin ár hjá familjuni Samuelsen. Ikki var skrivstova ella tilíkt til taks, so ta› arbei›i› var› alt gjørt á køksbor›inum uppi í Hoyvík. Og fundirnir vóru nógvir.

Javni hevur alla tí›ina veri› virki› felag. Nógv eru málini, felagi› hevur virka› fyri og fingi› loyst hesa tí›ina, felagi› hevur veri› til. Ta› fyrsta, minnist Hanus, var at fólk hóast andaliga ófullfør kundu sleppa at búleikast her í landinum. so kom Frítí›arheimi› í Skrivaragøtu, sum er umlættingarheim fyri breka› fólk. Anna›, sum er at nevna, er byggingin á Eirargar›i.

Jana bú›i heima hjá foreldrunum, til hon var 14 ára gomul. Tá flutti hon út á Eirargar› at búgva.

Seinnu árini hevur so aftur veri› betri tí› til ymiskt anna›, tey hava áhuga fyri. Eitt nú at fer›ast, sum tey hava gjørt serliga nógv av her heima.

Teimum dámar væl at koma út, siga tey bæ›i Hanus og Helena. Ganga í haganum og síggja og uppliva ta›, sum har er. Ans hava tey fyri vøkstri og tí, sum annars er í haganum.

Og nógv er at finna, vita tey at siga. Ikki fornoktar hesin áhugin seg heldur heima vi› hús. Sjáldsamir steinar og tinnur eru at síggja ví›a um í húsinum.

Men áhugin fyri bókum er heldur ikki til at fjala. Og ta› eru ikki bara bøkur hjá ø›rum. Bæ›i Helena og Hanus A. Samuelsen hava givi› fleiri bøkur út. Alt frá Føroyasøgu og bygdarsøgu yvir fer›afrásagnir til bók um vi›urskiftini hjá breka›um, sum er bók ogna› dóttrini Janu.

Hanus A. Samuelsen ætlar ikki at gevast at undirvísa, ver›ur lív og heilsa, hóast hann hevur starvast í 40 ár á Studentaskúlanum. Hann hevur nøkur ár eftir enn, til hann ver›ur pensionistur, og ta tí›ina ætlar hann at vera til arbei›is.

Fólk taka ofta til or›atøk og máliskur, sum tey sjálv ikki skilja. Tí ver›ur heldur einki fantilsi í samanhanginum, vísir Hanus A. Samuelsen á

Mynd: Edvard Joensen